## Besta undirtøkan í Suðurstreymi

Uppskotið um at broyta trónarvingalógina soleiðis, at gentur og dreingir hava sama rætt at arva donsku trónuna fekk størstu undirtøku í Surðurstreymi, har 92,3% søgdu ja. Í Norðoyggjum var undirtøkan lægst, har 80,5% søgdu ja. 88% av teimum føroyingum, sum vóru á vali í dag, atkvøddu fyri broytingini í grundlógini. Men tað var í Suðurstreymoy, at undirtøkan var størst, 92,3%. Næstbest var undirtøkan í Suðuronni, har 90,5% vóru fyri. Vágar 87,3% ja. Eysturoy 86,3% ja. Norðstreym 84,6% ja. Sandoy 81,7% ja, og í Norðuroyggjum søgdu 80,5% ja.



# Reint rukkulív at vera útróðrarmaður í dag

**Ein royndur útróðrarmaður, sum Sosialurin hevur tosað við, hevði á tveimum setum eina tímaløn uppá 10 krónur um tíman, meðan hann var í bátinum. – Manningarparturin fyri 42 tímar í bátinum var 420 krónur. Aðrir, sum hava størri bátar, hava havt hall upp á 5.000 krónur fyri hvørja setu tríggjar fylgjandi setur á rað, sigur útróðrarmaður**

ÚTRÓÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er ógvuliga óhugaligt at vera útróðrarmaður í tíðum sum hesum. Fáir mans loysa bátarnar, tí dagurin gevur einki – og ikki so sjáldan gevur dagurin hall.

Veiðan hevur ikki verið nakað serlig í longri tíð, men nú hava bátar fingið hvíting, sum teir plaga at fáa eystanfyri hesa tíðina av árinum.

Men eitt er vánaliga veiðan. Annað – og verri – er, at fiskaprísirnir eru so serstakliga vánaligir, at menn lítið og einki fáa fyri fiskin. Aftrat hesum kemur, at Fiskamarknaður Føroya er vorðin útróðrarmonnum ein alsamt dýrkandi liður, sum kortini ikki slepst uttan um, um yvirhøvur skal sleppast av við fiskin.

Til tjúgund og seinast, noyðast teir, sum eiga og reka útróðrarbátar, at rinda eitt nú barsilsgjøld og arbeiðsmarknaðargjøld, sum aftur fara avstað við einum parti av tí sindri, sum eftir er, tá avroknað verður.

### Reint rukkulív

Ein royndur útróðrarmaður, sum Sosialurin hevur tosað við, greiðir soleiðis frá, hvussu støðan er beint í løtuni:

- Í tríggjar útróðrardagar fiskaði eg 3.800 pund á tilsamans 36 línum, hevði 12 línur við hvønn dagin. Eg var í bátinum í tilsamans 42 tímar, og tá avroknað varð, var mín partur 420 krónur. Hetta gevur eina tímaløn upp á 10 krónur um tíman.

Útróðrarmaðurin sigur, at meginparturin av veiðini hesar tríggjar seturnar var hvítingur, sum fór fyri ein miðalprís á 6 krónur fyri kilo. Prísurin á hvítingi lá millum 5, 6 og 7 krónur fyri kilo hesar dagarnar.

- Seinasta dagin í hesi vikuni – fríggjadagin – fór prísurin á hvítingi upp á 10 krónur fyri kilo. Fiskurin varð keyptur av fiskakeyparum og sendur av landinum við farmaskipinum Silver Fjord, sum siglir av Toftum til Skotlands fríggjakvøld og mánakvøld. Orsøkin til, at keyparar góvu meira fyri fiskin fríggjadag, søgdu teir vera, at hetta var hin nýggjasti og feskasti fiskurin.





*Útróðrarmenn halda ikki, at tað munar nóg væl, at Silver Fjord siglir úr Føroyum við feskum fiski til Skotlands tvær ferðir um vikuna. – Hetta sæst ov lítið aftur í fiskaprísinum, halda teir*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Útróðrarmaðurin vísir á, at hetta er alt fiskur, sum fer av landinum við sama skipi, og tí dugir hann illa at síggja, hví so stórur prísmunur spyrst burtur úr, um fiskurin er veiddur hósdag ella fríggjadag, tá hann annars er so nýggjur kortini.

- Ein stórur vansi í Føroyum í dag er, at tað eru so fáir keyparar til eitt nú hýsu og hvíting, men eisini til brosmu og longu, leggur hann aftrat.

### Samanspæl?

Hann vísir á, at prísirnir á hýsu hava verið lítið øðrvísi enn prísirnir á hvítingi hava verið seinastu dagarnar.

- Vit hava fingið einar 5-7 krónur fyri kilo, men eisini prísirnir á hýsu fóru upp í einar 10 til slakar 12 krónur seinasta fríggjadag, tá Silver Fjord fór til Skotlands við fski. Eisini her hava keyparar somu frágreiðing, nevniliga at hetta er hin nýggjasti og besti fiskurin, og tí kvinka prísirnir uppeftir uppundir avskiping, sigur hann.

Eins og prísirnir á hýsu og hvítingi hava verið sera lágir, er sama galdandi fyri prísirnar á eitt nú brosmu og longu, sum eisini verður keypt til virkingar í Føroyum.

- Vit hava snøgt sagt fingið spottprís fyri hesi fiskasløg – ja, heilt niður í 3 krónur fyri kilo. Á Fiskamarknaði Føroya vilja tey ikki skilja brosmu og longu uttan eykagjald, tá hesin fiskur annars kundi farið fyri einar 6, 8 ella 10 krónur fyri kilo.

Útróðrarmaðurin vísir á, at tað bert eru tveir størri keyparar av brosmu og longu, og hesir eru Fiskavirkið í Gøtu og Vaðhorn á Strondum.

- Fyri okkum virkar tað, sum um virkini skiftast um